# TILTØK

**Missiónshúsið við Landavegin**
Í kvøld kl. 20 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Martin Thomsen.

**Lívdin**
*í Fimleikarhøllini*
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjuløta saman við børnunum við sangi og søgu, kl. 11.10 ein steðgur við drekka. Tilbiðjanarmøti verður kl. 11.30 har Jógvan Júst Rasmussen talar. Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30-12.15. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn.
Í morgin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 11.50 ABC »Grøðing við Jesu sárum« 2. partur við Sonna Djurhuus.
Einki møti kl. 18 vegna tiltak inni á Sundi í samband við vitjan av Anastasis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar forbøn ring 214067. www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Benny Blumensaat, presti í Mariukirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 18 Útimissiónsmøti v/ Christopher og Maureen Clarke.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans.
Sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18 Evangel. møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ manning frá Anastasis.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Útikonsert inni á Sundi kl. 18.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**M/V Anastasis**
Fríggjadagin til mikudagin 13. juli er møguleiki at vitja skipið millum kl. 10 og 17, tó sunnudagin millum kl. 13 og 21. Sunnukvøldið útikonsert á Sundi kl. 18 við føroyskum bólkum. Leygarkvøldið kl. 19.30 Afrikanskt kvøld í høllini á Nabb.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Signabø og Kollafjørður**
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 19 á Signabø og kl. 21 við Missiónshúsið í Kollafirði.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, luttøka frá Anastasis.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti við André Matras.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Rúna og Guru í Árantsstovu. kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ skandinavisku barnamissiónini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 20 Útimøti við posthúsið.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, Magnus Jensen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Malta Skagerak-fundirnir**
Cosmos Trawl, Østhavnen, Hirtshals. Fundirnir verða soleiðis: 8. juli og 23., 24. og 25. juli. Á fundunum 23.-25. juli luttaka ferðandi og onnur við vitnisburði og sangi. 5. august verður seinasti fundur. Allir fundirnir eru kl. 19.30. Aftaná fundirnar bjóða vit ein kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður stongt vegna umvæling frá:
**28. juni til 26. juli og frá 30. juli - 13. august.**
**Ólavsøkuframsýning verður í Tilhaldinum 28.-29. juli.**
**Brúðarmyndir 1919-1971. brúðarkjólar, fjarrit.**
**Søla: Drekkamunnur og drýlur í kjallaranum.**
**Opið: kl. 15.00-19.00.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – Gongutúrur**
Sunnudagin 11. juli verður gongutúrur til Fransatoftirnar uppi á Sátuni. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.00. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrurin Viðvík-Talvborð verður sunnudagin 11. juli. Farið verður av Leirvík kl. 9.00. Túrurin er tungur og heildagstúrur. Hav mat við. Avmarkað luttøka. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan fríggjadagin 9. juli kl. 15.: Runavík tlf. 449449 ella infoey-r@post.olivant.fo, Fuglafjørður tlf. 444860 ella infoey-f@post.olivant.fo

**Frá Ferðavinnuni í Suðuroy**
Taratúrur í fjøruni í Suðuroy tórskvøldið kl. 18. Bussur fer av Kunningarstovuni í Vági kl. 17.15 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 17.45. Koyrt verður á kajuna í Fámjin. Ætlanin er at vassa í mølini, taka tara, kanna hann, og læra um t.d nøvn, livistað, útbreiðslu osfr á ymiskum tarasløgum. Havi gummistivlar við. Eigur tú onkra bók um plantur og djór í fjøruni og hevur hana við so ger tað óivað túrin meiri áhugaverdan. Agnes Mols Mortensen og Niels Jacobsen eru heimildarfólk á túrinum. Bussur koyrir eftir lidnan túr úr Fámjin kl. 20 til ávikavist kunningarstovuna á Tvøroyri og í Vági. Tilmelding til taratúrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi tórsdagin kl. 16.00.
**Gongutúrur Víkarbyrgi – Akrar verður leygardagin 10. juli.**
Bussur koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av Kunningarstovuni í Vági (gamli skúli kl. 10.30. Túrurin er roknaður sum léttur at ganga og tekur milum 1 og 2 tímar.
Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi av Økrum til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági. Bindandi tilmelding til túrarnar skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.

**Myndaframsýning í Stóra Pakkhúsi í Vági**
Myndamaðurin Rógvi Johansen sýnir fram myndir í Stóra Pakkhúsi frá hósdegnum 8. juli til sunnudagin 11. juli.
Framsýningin fevnir um m.a. persónsmyndir, fornlutamyndir, landslagsmyndir, arkitektamyndir og reklamumyndir.
Framsýningin letur upp hósdagin kl. 17 og greiður Rógvi Johansen tá frá myndunum og framsýningini.
Framsýning er opin soleiðis:
Hósdag-leygardag kl. 17- 20.
Sunnudag kl. 16-20.
Vágs Sóknar Bygdasavn skipar fyri framsýningini.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
**Tilhaldið fer í summarfrí 1. juli og opið verður aftur 1. september.**

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
**Summarfrí verður frá 28. juni til 6. september 2004. Gott summar ynskir Fløvin.**

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10 · tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 10. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Berghild Bjarkadóttir Skúvadal og Klæmint Mittún, Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum.

Leygardagin 17. juli kl. 14.00 giftast í Funnings kirkju Jenny Petersen úr Funningi og Magnus Samuelsen úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 17. juli kl. 15.00 giftast í Hejls kirkju Kitty Ferjá Joensen, Kollafjørður og André Isholm Andrésen, Tórshavn. Dagurin verður hildin á Hotel Harmonien, Gåskærgade 19, 6100 Haderslev.

Leygardagin 24. juli giftast í Trongisvági Wenche F. Lindberg, Trongisvágur, dóttur Óla Jákup Lindberg, og Rúni Aarethún, Fanø, Norra. Veitslan verður fyri innbodnum inni á Sandinum hjá Jonnu og Óla Jákup Lindberg, Trongisvágur.

Leygardagin 24. juli giftast í Prestagarðinum á Sandi Tania Ørvarodd av Sandi og Gunleif Bjartalíð úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum í Slavandsdali. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í heimið eftir kl. 18.00.

Fríggjadagin 6. august kl. 15.00 giftast í Gøtu kirkju Katrin Sigurðsdóttir, Norðragøta og Karstin Kristiansen, Leirvík. Opið hús við nátturða og drekkamunni verður í Róðrarneystinum á Glyvrum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða biðin um at ringja á tlf. 443241 ella 441363 innan 30. juli.

Leygardagin 7. august kl. 14.00 giftast í Kollafjarðar kirkju, Sólvá í Homrum úr Kollafirði og Jógvan Egholm úr Vestmanna. Vælkomst verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 424242, 227016 ella 226677. Seinasta freist at siga frá er 25. juli.

Leygardagin 7. august giftast Jóna Petra Thomsen, Skopun og Jóhan Mikkelsen, Sørvágur. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 11.00. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum Samljóð í Skopun kl. 19.00. Teistin siglur úr Skopun á Gomlurætt sunnumorgunin kl. 04.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. juli á tlf. 332312, 361575 ella 253001.

# SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 12. juli hava Jóngerð og Sjúrður Mikkelsen, Sørvágur, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin heima við hús sunnudagin 11. juli frá kl. 10.00 á morgni. Øll eru hjartaliga vælkomin.



## Heilsuskúli Føroya
**800 Tvøroyri**

Søkir eftir avloysara fyri lærara, 3/4 tíð, at byrja 01.09.2004 til og við 01.10.2005.

Somuleiðis er eitt tíðaravmarkað starv fyri lærara, 1/2 tíð, leyst at søkja frá 01.09.2004 til 01.10.2005.

Starvið umfatar undirvísing av heilsuhjálparanæmingum, fyrireiking og tilrættisleggjan í samband við undirvísing.

Tú skalt hava eina miðallanga framhaldsútbúgving, sum er viðkomandi fyri heilsuútbúgvingarnar t.d. sjúkrasystur, ergofysioterapeut, føðslu- og húsarhaldsfrøðingur e.l. Fyrimunur er, um tú hevur námsfrøðiliga eftirútbúgving ella aðra eftirútbúgving, skeið v.m.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt í tínari undirvísing. Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir, í tøttum tvørfakligum samstarvið ímillum lærarnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í 5 yrkislærugreinum, ið eru tann: handaliga, mentanarliga, virksemisskapandi, námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga, almanna/samfelagsliga og røktarliga yrkislærugreinin, við 20 % úr hvørjari grein.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til deildarleiðaran á skúlanum á tlf. 372 855.

Umsóknarfreistin er 12. juli 2004, og umsóknir skulu sendast til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya**
att: Súsanna Mortensen, vararektara,
Eirargarður 14 B,
FO-100 Tórshavn

## Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegi 12. juli 2004. Opið verður aftur mánadagin 2. august 2004.

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$-$12^{00}$ og $13^{00}$-$16^{00}$
Tórmó›ur Djurhuus, adv. Ingi Højgaard, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar

ÓLAVSØKAN
2004
Seinasta freist at lata tilfar til inn til ólavsøkuskránna er hósdagin 8. juli
Kunningarstovan
315 788

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
Sosialurin 341800
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

## Frá Nes kommunu

Kommunuskrivstivan er stongd vegna summarfrí: Viku 30, 31 og 32 í 2004.

Um átroðkandi ørindi eru í hesum tíðarskeiði ber til at ringja á

**Tlf. 217586 millum kl. 10.00-12.00**

**Nes kommuna**

Sosialin

www.sosialurin.fo

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Frumsýning
Hósdagin 08.07. kl. $19^{30}$
Hósdagin 08.07. kl. $22^{15}$
Billettprísur: 70,- kr.



Hósdagin 08.07. kl. $20^{00}$



Hósdagin 08.07. kl. $22^{30}$

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola -
Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu